# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




# »Ud i det blå«



**BlueMotion og Bluetec**
**Blue stendur fyri AdBlue, ið er eitt registrerað vørumerki fyri AUS32 (Aqueous Urea Solution 32.5%), sum verður brúkt í prosessini sum nevnist Selective Catalytic Reduction (SCR) til at minka um útlátið av nitrogenoxid (NOx) frá útstoytum á dieselbílum.**

**Bluetec og BlueMotion eru nøvnini á nýggju umhvørvisvinarligu bilunum hjá ávikivst Mercedes-Benz og Volkswagen. Báðar verksmiðjurnar brynja seg til strongu umhvørvislógirnar sum koma í gildi komandi árini**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Veðurlagsbroytingarnar hava stóra ávirkan á bilaframleiðsluna um allan heim í hesum døgum. Bilverksmiðjurnar kappast um at koma á marknaðin umhvørvisvinarligum bilum.

Elbilar, brintbilar og hybridbilar umfram nógvar aðrar loysnir eru longu á marknaðinum eins og arbeitt verður av øllum alvi fyri at finna tær bestu loysnirnar áðrenn strongu umhvørvislógirnar koma í gildi. Stórt trýst er lagt á bilverksmiðjurnar um at framleiða bilar, sum dálka minst møguligt.

Mercedes-Benz og VW komnir á marknaðin við sínum boðum upp á umhvørvisvinarligar bilar við ávikavist Bluetec og BlueMotion útgávum.

## Bluetec

Bluetec er heitið á nýggju framkomnu tøknini hjá Mercedes-Benz, sum teir nú fara at bjóða fram í sínum dieselútgávum. Útlátið, sum kemur úr útstoytinum er munandi minni, og motorarnir eru sera økonomiskir.

Fyrsti Mercedes-Benz Bluetec á evropeiska marknaðinum er E 300, sum longu nú lýkur Euro5-normin fyri útlát, sum kemur í gildi 2011. Samstundis upplýsa Mercedes, at teir í løtuni arbeiða víðari við Euro6-norminum, som kemur í goldi í 2015. Mercedes-Benz koma eisini við hesi tøkni til sínar lastbilar.

## BlueMotion

VW eru komnir á marknaðin við einum nýggjum Passat BlueMotion, sum er ein sera umhvørvisvinarligur og økonomiskur bilur.

Motorurin í Passat BlueMotion er ein 1.9 TDI við 105 hk og einum snúningsmomenti upp á 250 Nm heilt frá 1900 snún./min. Bilurin koyrir 19,6 km/l (blandað koyring).

Í mun til vanliga TDI-motorin hjá Volkswagen við partikulfiltri, er CO2 útlátið frá Passat BlueMotion minkað við millum 15 og 19 g/km. Útlátið er einans 136 g/km fyri Passat sedan, og 137 g/km fyri Passat Variant (stationcar).

Fyri at minka um vindmótstøðuna eru ymiskar broytingar gjørdar við undirvogninum, og bilurin t.d. senkaður aftan og framman og hjólini eru monteraði við Hightech-dekkum (Best in Class Energy tyres).

Við hesi útgávuni er Passat BlueMotion ein av mest umhvørvisvinarligu bilum í miðalklassanum.


*VW Passat BlueMotion er ein av mest umhvørvisvinarligu bilum í miðalklassanum*





*E300 Bluetec er fyrsti Mercedes-Benz við nýggja umhvørvisvinarliga dieselmotorinum*